# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Teir borgarligu vunnu í Svøríki

Valið í Svøríki gjørdist ein sigur fyri høgravongin og ein skelkur fyri vinstravongin. Hinvegin var úrslitið ikki óvæntað. Sosialdemokratarnir hava sitið við valdinum í trý valskeið á rað, og enn er so ongantíð hent tað, at ein stjórn hevur vunnið fyri fjórðu ferð á rað. Men sjálvandi eru aðrar orsøkir til ósigurin hjá Gøran Persson-stjórnini. Ein tann mest upplagda orsøkin er, at hóast Svøríki er heimsins besta land at liva í, so hevur ikki eydnast stjórn Perssons at beina arbeiðsloysið burtur. Svøríki hveur 5% vinnuloysi, meðan arbeiði er til allar henduer í øllum grannalondunum. Orsøkin er m.a. bygnaðarbroytingar innan svenska vinnulívið, flyting av fyritøkum og virkjum til láglønarlond. Tað hevur ikki eydnast at leggja upp fyri hesi skeivu gongd við tí poltikki, ið stjórnin hevur rikið.

Í aðrar mátar hevur gingið sera væl. Eingir álvarsamir trupulleikar eru av innflytara-politikkinum, og breið semja hevur verið um uttanríkispolitikkin. Nú kemur so ein sera høgravend stjórn og fer hon helst undir stórar skerjingar av almenna sektorinum og undir privatiseringar. Hvussu hetta fer at ávirka støðuna á arbeiðsmarkanðinum er ein stórur spurningur. Høgrastjórnin fer eisini at fremja skattalættar og kann hetta fara at ávirka vælferðina í heimsins besta vælferðarsamfelag.

Spennandi verður um høgrastjórnin fer at broyta uttanríkispolitikkin. Svøríki hevur verið eitt álitið hjá ST og sýnt sera stóran solidaritet í altjóða høpi. Hóast tað sjálvandi finnast viðurskifti í Svøríki, sum eru verd at finnast at, t.d. halda mong, at alt ov mong forboð eru galdandi har, so man Svøríki teljast millum heimsins bestu lond. Vit hava so eisini sæð, hvussu væl sviar hava klárað seg í nógvum ítróttargreinum, og man tað eisini stava frá tí, at fundamentið undir samfelagnum er so gott. Nú skulu so teir borgarligu sleppa at royna seg. Tað er sunt og gott fyri demokratiið, at nýggir flokkar eisini koma framat bara hesir ikki oyðileggja alt tað góða, sum er bygt upp. Nú fáa vit so at síggja, hvat hesir flokkar kunnu tilføra svenska vælferðarsamfelagnum.

**Sosialurin**

## Gallup og Tjóðveldisflokkurin

**JOHAN SAMUELSEN**



Í samband við, at tað eru liðin 60 ár síðani fólkaatkvøðuna 14. sep. 1946, so hevur Tjóðveldisflokkurin biðið Gallup Føroyar um at gera eina veljarakanning. Umframt veljarakanningina varð eisini spurt um fleiri onnur týðandi samfelagsmál, sum bera brá av, at hesi mál hava eitthvørt við ríkisrættarligu støðuna millum Føroyar og Danmarkar at gera.

At kanna fólkahugsanina er blivið ein »trend« í okkara tíð. Vit hava fingið okkara egna Gallup kanningarstovn, og ringt verður í eyst og vest fyri at spyrja um eithvørt, sum hevur almennan áhuga. Men hetta fyribrygdi, at ein politiskur flokkur sjálvur fer út at spyrja, hvussu hann er umtóktir millum fólk, man hoyra til undantøkini. Og alt avgerandi fyri, hvussu úrslitið verður, er fyrst og fremst, hvussu spurningarnir verða orðaðir – ein uttanveltað, lættfatulig og beinrakin orðing, sum er bæði væl og virðiliga orðað, er fyrsta treytin fyri eini objektivari og sannari analysu av verunligu støðuni millum tey gott 500 fólkini, sum vórðu spurd, og harvið eitast at umboða samlaðu veljarafjøldina.

Føroysku fjølmiðlarnir hava verið á tremur við úrslitum av hesi somu kanning Tjóðveldisfloksins. Og ikki er hissini, sum teir serverað fyri okkum. Alt verður penslað út, og hesin »tíðindaflutningur« verður tambaður og toygdur úr hvørjari likkju yvir alla vikuna, uttan at seta minsta spurnartekin við hesa somu kanning. Og tó, eittans blað hevur róð beinleiðis uppundir, at henda kanningin var bíløgd av Tjóðveldisflokkinum! Og hevði flokkurin eisini orðað spurningarnar! Kringvarpið skal eitast fyri at vera borganin fyri, at public service tænastan verður vard og framborin millum manna. Men tey hava verið eina grammast í Sortudýki at borið hesar »kanningar« út millum fólk, uttan minsta vet av borandi journalistikki, og úrslitini hava verið framborin, sum vóru tey ævigi og einasti sannleikin. Hvar er journalistiska handverkið?

Lat okkum taka tvey dømi úr allari rúgvuni. Spurt varð um: Hvør skal hava evsta avgerðarrættin í Føroyum – danskir myndugleikar ella føroyska fólkið? Jú, kunngjørt varð í fjølmiðlunum, at heili 81% ella 8 av 10 føroyingum tóku undir við føroyskum avgerðarrætti. Og Høgni Hoydal var skjótur at proklamera, »at ein stórur meiriluti av fólkinum tekur undir við at skipa Føroyar sum frælsa tjóð. Trupuleikin liggur í politisku flokkunum.« Jú, gaman í, tøl plaga ikki at lúgva, so hetta man vera sannleikin, hugsa væl tey flestu. Men hyggja vit eftir, hvussu spurningarnir eru orðaðir, og hvat teir merkja í veruleikanum, so er talan ikki so greið, sum Høgni mælir fyri munni! Hesin spurningur merkir onki annað enn loysing frá Danmark. Evsti avgerðarrættur merkir, at øll bond skulu kvettast til hinar partarnar av ríkinum, og hví verður ikki spurt av Gallup, um tú vilt loysing ella samband – hetta er erlig tala, og hetta hevði verið í samsvari við spurningarnar, tá fólkaatkvøðan varð hildin í 1946. Onki uttanumtos, ongin fjald, ullint ætlan. Nei, nú verður ikki spurt um loysing ella samband – í »kanningini« verður spurt um føroyskan avgerðarrætt – ja, hvør vil ikki avgera, men hvat? Ikki so frægt, at Tjóðveldið torir at spyrja um fullveldi, sum annars varð brúkt í heili 6 ár í landsstýrisfíggjaðu propaganduni í Tinganesi at villleiða fólk við, sum eitt jaligt orð, sum lætt er at svølgja. Men evsti avgerðarrættur merkir stutt og greitt loysing, hetta orð, sum Tjóðveldisflokkurin ikki vil kennast við longur. Royktámið hesaferð eitir avgerðarrætturin, sum Høgni Hoydal og fjølmiðlar kappast um at varpa út millum fólk, uttan at seta ein einasta spurning við hesa manipulerandi útsøgn! Høgni smírist og fegnast, hvussu lætt hann er sloppin í fjølmiðlunum og brúkar »úrslitið« sum trumfkort í vikulongu loysingarpropaganduni – er tað ongin sum raknar við í fjølmiðlaverðini – fleiri, sum spurd eru, í »kanningini« føla seg milt sagt misbrúktan í einum ódámligum leiki! Ella eru tit almennir serviseringsstovnar fyri Tjóðveldisflokkin? Hetta er óbeinleiðis bæði ein leiðandi og ógreiður spurningur at seta fólki – míni ráð til tykkum næstu ferð, tit fara at spyrja um ríkisrættarligu støðu Føroya, so spyrjið um tygum vilja hava loysing ella samband – onki uttanumtos og innballing í ivasom hugtøk, sum Høgni hevur funnið uppá! Tit høvdu tjansin í 6 ár, men tit tordu ikki at spyrja fólkið beinleiðis. Hví? 81% eru fyri, ikki so Høgni, so tað skuldi verið lagamanni? Men tit vita betri.

Hin spurningurin snúði seg um avgerðarræættin í hernaðarmálinum. Sama søgan. Avgerðarrætturin í hernaðarmálum liggur eins og suverenniteturin í ríkiseindini, beinleiðis nevndur í Heimastýrislógini, men stórur meiriluti er fyri evsta avgerðarrættinum her heima í hernaðarmálinum, greiðir Tjóðveldisflokkurin frá. Hvat merkir henda støðutakan í veruleikanum? Hava tey spurdu í eini handavend gjørt sær djúpthugsandi niðurstøður til henda sera álvarsama spurningin, áðrenn svarað varð? Skulu vit úr NATO felagsskapinum, sum Tjóðveldið einaferð var størsti forsprákari fyri, ella hvønn skulu vit lena okkum uppat í framtíðini o. s. fr. Aftur sama mjørkatosið – men fjølmiðlarnir elta ókritiskir!

Saknaði annars ein spurning, sum plagar at vera eitt »must« í slíkum veljarakanningum, og tað var, hvønn føroyingar vilja hava til løgmann? Man tað vera tí, at júst hetta kanningarúrslitið ikki passaði inn í krammið hjá Høgna at almannakunngera? Fekk hann hesi somu neyðars 3-4%, sum hann plagar at fáa sum løgmansevni? Og so »gloyma« vit bara løgmansspurningin saman við »fantastisku« fjølmiðlum okkara!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.